# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### 70 ára føðingardagur

Í dag, 12. februar, verður Árni Johannesen, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin frá kl. 10.00-15.00 heima hjá Jørgini og Tóru, Faksagøta 5.

### 50 ára føðingardagur

Sunnudagin 13. februar verður Niels Olgar Joensen í Sandavági 50 ár. Dagurin verður hildin við hús leygardagin 12. februar. Opið hús verður frá kl. 18.00 og kl. 22.00 verður grannaveitsla.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 15. februar hava hjúnini Lis og Zacharias Zachariassen í Norðragøtu verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 19. februar, har opið hús verður frá kl. 16.00 til 22.00.

### Gullbrúdleyp

Sunnudagin 13. februar hava Lilljan og Janus Sørensen í Húsavík verið gift í 50 ár.

### Prógv

Marita Regsinsdóttir av Steinum, Argjum, hevur 19. januar lokið læknaprógv á universitetinum í Keypmannahavn.

Siri Mortensen, Hvalba, hevur 20. januar á Esbjerg Seminarium tikið professionsbachelor prógv sum pedagog.



*Jensia Augustinussen úr Sandavági hevur tann 28. januar 2005 lokið prógv sum 'chartered accountant' (ríkisgóðkendur grannskoðari) á 'Chartered Institute of Public Finance and Accountancy' (CIPFA) í London.*

Anfinn Kallsberg, fólkatingslimur:

# Opið hús á Hotel Norð

**Í sambandi at Anfinn Kallsberg hevði eitt við framúr gott valúrslit til fólkatingsvalið, beyð hann til opið hús á Hotel Norð á Viðareiði mikukvøldið**

OPIÐ HÚS
*Myndir: Helena Kallsberg*



*Hóast storm og kavarok mikukvøldið møttu umleið 150 fólk til opið hús á Hotel Norð á Viðareiði*

Hóast storm og kavarok mikukvøldið møttu umleið 150 fólk til opið hús á Hotel Norð á Viðareiði í samband við at Anfinn Kallsberg gjørdist stóri atkvøðuslúkurin við valið hesuferð við ikki færri enn 3276 persónligum atkvøðum.

Anfinn Kallsberg beyð øllum gestunum vælkomnum og fleiri nýttu høvið at siga nøkur orð, tey vóru: Eyðun Elttør, Jógvan Gerðalíð, Jákup Mikkelsen, úr Klaksvík, Rúna Sivertsen, úr Streymnesi, Helena Kallsberg, av Viðareiði, og Óli Breckmann av Argjum.



*Jógvan Gerðalíð úr klaksvík heldur røðu*



*John Júst á Marknagili og Óli Breckmann*



*Anfinn Kallsberg gjørdist stóri atkvøðuslúkurin við valið hesuferð við ikki færri enn 3276 persónligum atkvøðum*

# Gullbrúdleyp



Sunnudagin 13. februar hava Lilljan og Janus Sørensen í Húsavík gullbrúdleyp. Gullbrúdleypsveitslan verður hildin í ungmannafelagshúsinum leygarkvøldið. Tey búðu í Havn til 1987, tá ið tey fluttu til Húsavíkar.

Lilljan fødd í Havn 1934, dóttir Betti og Jens Paula Rein. Hon valdi sær skrivstovuyrki sum lívsstarv, og arbeiddi hon á skrivstovunum hjá Poul Hansens heilsølu, Dronning Alexandrines Hospital, Føroya Fiskimannafelag, Dómaraskrivstovuni, Advokatskrivstovuni á Bryggjubakka og tá ið skattadeild varð stovnað í Skopun í 1987, fekk hon starv har.

Janus er føddur í Húsavík 1933, sonur Annu og Antinis Sørensen. Antinis var tingmaður fyri Fólkaflokkin í Sandoyar valdømi frá 1940 til 1954. Janus fór 14 ára gamal til Havnar at læra til snikkara hjá Hartvig Hansen, snikkarameistara. Útlærdur arbeiddi Janus á verkstaðnum hjá Jóhan Ziska, og tá ið Jóhan Ziska gjørdist stjóri á tekniska skúla, høvdu hann og Tórálvur Fagradal eina tíð verkstaðið undir navninum Fagradal og Sørensen. Janus fór síðani at arbeiða á Snikkaraverkstaðnum í Grønlandi, og arbeiddi hann har til tey flutti til Húsavíkar at búgva. Í Sandoynni arbeiddi Janus fyrst saman við Ólavi Groth og síðani hjá byggivirkinum J. & K. Petersen.

Bæði Lilljan og Janus gjørdi á ungum aldri fimleik í Havnar Fimleikarfelag, tá ið hjúnini Kirsten og Martin Holm vóru leiðarar. Janus róði eisini kapp, fyrst við áttamannafarinum "Royndin Fríða" úr Húsavík, sum ungir Húsavíkingar í Havn høvdu lænt norður at rógva við, seinni róði hann við 10-mannafarinum "Studenturin". Lilljan og Janus dáma væl at dansa, bæði føroyskan og útlendskan dans, og dansaðu tey í "Dansifrøi", og í Húsavík hevur Lilljan, saman við øðrum, skipað fyri dansiskeiðum.

Einaferð skóti, altíð skóti verður sagt. Lilljan hevur verið KFUK-skóti alt sítt lív, nú í fjórðu grein, og tá ið hon flutti til Húsavíkar, skipaði hon fyri, at skótalið varð stovnsett í bygdini.

Lilljan og Janus eiga fýra børn, Finnur, Tórkil og Marita búgva í Havn, og Sólvá býr í Danmark.